tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Høgni Mohr
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Caragata og vinnulívsorðaskifti

## *Oddagrein*

Caragata álitið hevur ikki álit á norðurlendska vælferðarsamfelagnum. Finnbogi Arge er endurgivin fyri at hava sagt, at Caragata álitið vísir á ymsar leiðir. Her mugu vit beinanvegin rætta FA. Her er ikki talan um fleiri leiðir, her er bert talan um ta nýliberalistisku leiðina, ið Bretland og New Zealand hava fylgt við tí úrsliti at búskaparligur framburður hjá nøkrum ger, at onnur gerast fátækrastatt.

Tað verður mangan ført fram, at hesi lond hava eitt sosialt trygdarnet eins og Norðurlond. Tað kann væl verða, men har má man so siga, at meskavíddin er betýðiligt størri í tí New Zealandska og bretska trygdarnetinum, tí har eru fólk, ið fella ígjøgnum.

Skattaprocentið í Føroyum er ov høgt verður sagt í Caragata álitinum. Fyrst og fremst er at siga, at Caragata álitið fer í so lætt um hvørja ávirkan ymisk sløg av skatti hava á samfelagið. Tað er munur á hvussu MVG og t.d. partafelagsskattur ávirka samfelagsbúskapin - hettar kundi ein og hvør búskaparfrøðingur fortalt landsstýrinum uttan júst Caragata rithøvundarnir eftir øllum at døma. At Caragata álitið kemur við einum sokallaðum optimalum skattasatsi fyri Føroyar eftir at hava kannað samfelagið í stutta tíð virkar eitt sindur lættkeypt, serliga tá hugsað verður um, at onkur av rithøvundunum hava roknað ein líknandi optimalan skattasats fyri USA sum var lægri enn núverandi skattasatsur í USA, ið als ikki ber einum vælferðarsamfelagi. Uppskriftin hjá Caragata er, at lægri skattur gevur búskaparvøkstur. Samanhangurin er ikki eintýðugt ávístur — heldur ikki í New Zealandi, har Caragata eksperimentið er komið longst.

Um hesin samanhangur var ávístur, so stóð álitið eitt sindur sterkari. Óansæð hvussu væl álitið er skrúvað saman fakliga, so er diskussiónin ikki bert hvussu fakliga undirbygt álitið er og hvønn prosentvøkstur vit vilja hava í búskapinum. Spurningurin er hvussu okkara samfelag skal síggja út. Er hægst møguligi búskparvøkstur í bruttotjóðarúrtøku eitt mál í sær sjálvum. Her eigur svarið at vera nei, um hettar bert kann náast við at økja um ójavnan í samfelagnum. At man so tosar um útlicitering av smáarbeiðum er neyvan nakað stórmál. Landið útliciteraði arbeiði longu í 1973.

Vælferðarsamfelagið er ikki ein sjálvfylgja. Pensionistarnir og tey veiku í samfelagnum hava tað ikki ov gott sum er, og vit vita sum er, at verður okkara samfelag innrættað sum Bretland og New Zealand, so verða tað tey veiku, sjúku og illa útbúnu í samfelagnum sum koma at sita við sviðið soð. Minstulønin í Bretlandi er umleið 40 krónur um tíman.

Tað er gott, at man nú fer at diskutera Caragata álitið, tí eitt nú Fólkaflokkurin tekur undir við nógvum av innihaldinum, men tá tað kemur til fiskivinnuna, so bakka teir. Spurningurin er, um tað ber til at sortera í hesum. Kanska er tað ein ja ella nei spurinngur, tí liberalisering er so løgin, at tað er sum ein hummararúsa. Er man fyrst komin inn, so ber bert til at sleppa longur inn. Út vendst eftir øllum at døma ikki aftur.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Hetta var ikki ætlanin

Hesa seinastu tíðina hevur eitt sindur av kjaki tikið seg upp um eina samrøðu, sum Sosialurin hevði við meg fríggjadagin 4. februar undir yvirskriftini »Hergeir sveik Suðuroynna«.

Samrøðan var ein viðmerking til atkvøðugreiðsluna á Føroya Løgtingi beint frammanundan, tá ið uppskotið um at leggja oljuvinnuhavn í Suðuroynni varð felt.

Fyrst má eg biðja um umbering fyri, at eg geri so seint vart við meg. Men orsøkin er, at beint aftan á at samrøðan kom í blaðið, varð eg innalagdur á sjúkrahús, har eg bæði varð viðgjørdur við sterkum, pínudoyvandi heilivági og øðrum heilivági, sum hevur ført við sær, at tað, sum er farið fram teir 13 dagarnar, eg varð innlagdur, stendur rættiliga kámt fyri mær, og nógv av tí havi eg als onga hóming av.

Tí kemur hendan viðmerkingin ikki fyrrenn nú.

Lat meg fyrst gera greitt, at hóast eg eri næstformaður í Suðuroyar Oljuvinnuráð, var tað ikki sum slíkur, at eg úttalaði meg til Sosialin.

Lat meg síðani sláa fast, at samrøðan varð gjørd beint aftan á, at uppskotið um oljuvinnuhavn í Suðuroynni varð felt, og tí ímeðan vónbrotið enn var rættiliga stórt. Tí eri eg harmur um, at eg úttalaði meg so bersøgið, og eg skal vera tann fyrsti at viðganga, at varð samrøðan gjørd eitt sindur seinni, hevði eg havt vandað mær betri um orðini, og so hevði orðaljóðið eisini verið øðrvísi.

Av tí at eitt bræv, sum Hergeir Nielsen hevur sent oljuvinnuráðnum um støðu Tjóðveldisfloksins í spurninginum um oljuhavn í Suðuroy varð prentað í Sosialinum saman við samrøðuni við meg, hava mong fingið ta fatan, at tað eri eg, sum havi latið blaðnum brævið.


# Rætting og treytaleys umbering til Hergeir Nielsen

**MEINING**

**Rógvi Thomsen**

Fyri at skaða annars frálíka samskiftið millum løgtingsumboð Tjóðveldisfloksins og Suðuroyar Oljuvinnuráð skrivaði Sosialurin í farnu viku yvir alla forstíðuna, at: »Hergeir sveik Suðuroynna«, og bleiv eg sera skakkur av, at tað var eg, sum bar hesi tíðindi.

Aftan á hesa sera niðrandi forsíðu skrivar blaðið síðani á triðju síðu eina samrøðu við meg sum næstformann í Suðuroyar Oljuvinnuráð, og er hetta ein ikki minni niðrandi grein um Hergeir Nielsen, har mín niðurstøða skuldi vera, at hesin ikki var skikkaður at sita á tingi umboðandi Suðuroynna. Innrammað í greinina var síðani eitt innanhýsisskjal hjá Suðuroyar Oljuvinnuráð, og eingin ivi sást vera um, at eg og oljuvinnufelagið stóðu aftanfyri átakið móti løgtingsmanninum.

Avsannað verður upp á tað hvassasta, at eg havi latið Sosialinum hetta skjal, og avsannað verður somuleiðis, at eg havi úttalað meg sum næstformann fyri Suðuroyar Oljuvinnuráð. Eg segði Sosialinum, at samgongan eftir mínum tykki hevði svikið útjaðaran.

Samrøðan við Sosialin verður gjørd politisk og kemur út í røttu løtu við hesum spotti av løgtingsmanninum millum aðru og triðju viðgerð av kolvetnismálinum, og hoyrdu vit m.a. ein floksformann undir triðju viðgerð standa og flagga við samrøðu míni á tingsins røðarapalli við teirri niðurstøðu, at Hergeir Nielsen var bæði svíkjari og orðloysingur.

Tað sum Sosialurin vísti móti Hergeiri Nielsen var skaðafrøði og skaðavirksemi av ringasta slag og verður harðliga átalað, avvíst og samstundis verður ein treytaleys umbering veitt Hergeiri Nielsen fyri mín leiklut, ið var ein samrøða við Sosialin, sum eg á ongan hátt kann kennast við hvørki í innihaldi, uppseting ella á prenti.

Tvørturímóti kenni eg løgtingsmannin fyri Tjóðveldisflokkin sum ein sera sakligan mann, ið vil Suðuroynni og oljufelagnum alt tað besta í ídna virksemi sínum fyri áhugamálum okkara, har vit ongantíð hava kent hann sum ein svík, men tvørturímóti hevur hann arbeitt av øllum alvi fyri at leggja eina útgerðarhavn í Suðuroy. Tað eigur Hergeir Nielsen mín fulla stuðul og takk fyri í hesum máli.

Tað harmar meg ótrúligt, at blíva brúktur politiskt í samrøðuni, tí hóast politiskt ósamdir, meti eg Hergeir Nielsen væl skikkaðan at sita á tingi og umboða Suðuroynna og okkara áhugamál. Tað er rætt, at hann sum tann fyrsti skrivaði okkum bræv eftir áheitan okkara um sum skjótast at svara okkum einum fyrispurningi.

Hví Sosialurin leggur so stóran dent á at krógva burtur, at Hergeir Nielsen heilar tvær ferðir á tveimum fundum, har allir tingmenn í Suðuroynni vóru við, segði okkum, at ikki kundi roknast við somu niðurstøðu í einum tingmáli, sum tá ið málið var til viðgerðar í landsstýrinum, sigur mær, at tað er størri áhugi í einum fyribils bíligum politiskum løtuvinningi, hvat eg ikki vóni tað blívur framyvir.

Tað er sera óheppið og púra óskiljandi, at seta suðringar – teir sum enn hava vilja og orku at stríðast fyri okkara felags søk – upp móti hvørjum øðrum. Hetta skaðar mítt trúvirði sum næstformann í oljufelagnum, SOC, eins og tað skaðar trúvirði hjá teimum, ið vit samskifta við.

Í vónini um at politiskur friður verður um áhugamál okkara suðringa, heiti eg á allar persónar og flokkar, ið vilja Suðuroynni væl um at standa saman, heldur enn at skilja sundur.

Eg vænti mær, at áhugamál okkara á kolvetnisøkinum verða lyft upp á eitt hægri støði enn tær persónligu útspillingar, ið tey nú liggja niðri á.

*Rógvi Thomsen sigur, at Hergeir Nielsen hevur skrivað brævið, sum stóð í Dimmalætting 9. februar. Avtalað var, at Hergeir bert skuldi skriva, at Rógvi Thomsen ikki hevði latið Sosialinum brævið, sum Hergeir Nielsen sendi Suðuroyar Oljuvinnuráð*

Lat meg tí gera púra greitt, at Sosialurin hevur ikki fingið umrødda bræv frá mær. Eins og Suðuroyar Oljuvinnuráð fyrr hevur gjørt greitt, er tað eisini mín áskoðan, at talan var um eitt bræv til Oljuivinnuráðið, sum ikki eigur at verða almannakunngjørt, og hetta vóni eg ikki verður lagið í framtíðini.

Eftir greinina varð samband millum Hergeir Nielsen og meg, har eg harmaðist orðaljóðið í greinini.

Hergeir Nielsen var eisini rættiliga harmur um, at umrødda bræv, sum hann hevði sent Suðuroyar Oljuvinnuráð, var endað í Sosialinum, og av tí at eg varð innlagdur á sjúkrahús, skuldi hann orða eitt lesarabræv fyri meg, har eg avsannaði, at eg hevði latið blaðnum brævið.

Tað, sum kom burturúr, er ein »Rættleiðing og treytaleys umbering til Hergeir Nielsen«, sum stóð í Dimmalætting mikudagin 9. februar.

Eg má viðganga, at tað var ikki hetta, eg hevði meint við, tá ið eg bað løgtingsmannin hjálpa mær við eini rættleiðing. Tó má eg eisini viðganga, at eg minnist ikki, at Hergeir Nielsen hevur ringt til mín á sjúkrahúsið og lisið rættleiðingina upp fyri mær í sínum fulla orðaljóði. Men eg skal eisini leggja afturat, at sigur hann, at hann hevur gjørt tað, fari eg heldur ikki at vísa tí aftur, tí havandi støðu mína í huga, kann tað væl vera hent, uttan at eg minnist tað.

Tá ið blaðstjórin á Dimmalætting sigur, at hon hevur ringt á sjúkrahúsið og lisið greinina fyri mær, og at eg skal hava góðkent hana alla, sum hon er, uttan eitt reglubrot, fari eg sjálvandi at trúgva henni. Men tíverri minnist eg onki til tað.

At politikkur var drigin upp í málið um oljuvinnuhavn harmar ongan meiri enn meg sjálvan, tí tað hevur málið ikki uppiborið.

Sum lesarin nú kanska hevur skilt, vóru tað tær sera óhepnu umstøðurnar, sum gjørdu, at málið kom soleiðis fram, sum tað kom. Og tað var als ikki ætlanin, tí yvirhøvur má eg siga, at vit í Suðuroyar Oljuvinnuráð hava havt eitt gott samstarv við Hergeir Nielsen, eins og við hinar tríggjar løgtingsmenninar fyri Suðuroynna og við aðrar løgtingsmenn við.

Hesar viðmerkingar eru skrivaðar í vónini um, at hetta málið, ið umstøðurnar gjørdu, kom so stak tvørt fyri, ikki fer at nerva samstarvið í Oljuvinnuráðnum og ímillum Oljuvinnuráðið og politikararnar og annars øll, ráðið samskiftir við.

Vónandi er tað síðsta orðið sagt í hesum máli, tí nú ræður um at hyggja fram eftir.

**Vinarliga**
**Hvalba 21.02.2000**
**Rógvi Thomsen**

# Hugsanardagur - ein altjóða skótadagur



Týsdagin 22. februar, halda skótar kring allan heimin hugsanardag til minnis um stovnara skótanna Robert Baden-Powell og konu hansara Olave Baden-Powell, ið bæði høvdu føðingardag 22. februar.

Í ár eru 143 ár síðan Baden-Powell varð borðin í heim og 93 ár síðan skótarørslan sá dagsins ljós.

**Hugsanardagurin**

22. februar verður nevndur hugsanardagur. Dagurin verður hildin av skótum kring allan heimin sum ein altjóða skótadagur, og verður á enskum nevndur "Thinking Day" ella "World Friendship Day".

Ymiskt er hvussu dagurin verður kring um heimin, men felags er, at skótarnir hugsa um skótasystrar og -brøður kring allan heimin.

Hugsanardagin savnast skótar í Føroyum til gudstænastu - at minnast stovnaran: Lord Baden-Powell og konu hansara, Lady Baden-Powell, ið bæði fyltu henda dag,

- at minna hvønn annan á skótalógina, og at ein sum skóti er við í heimsins størstu barna- og ungdómsrørslu, við 25 milliónum skótum í fleiri enn 160 londum,

- at skótar í øllum heiminum eru vinir, hvør so er átrúnaðurin, húðaliturin ella mentanin.

**Skótagudstænastur 22. februar**

Í Føroyum verður hugsanardagurin hildin við skótaguðstænastum kring landið, har talvan gongur fyri Skótahjálpina.

- í Havnar kirkju kl. 19.00
- í Kvívíkar kirkja kl. 18.30
- í Sørvágs kirkju kl. 20.00
- í Leirvíkar kirkja kl. 19.00
- í Christianskirkjuni í Klaksvík kl. 20.00





*Gardar Joensen, stjóri, uttan fyri kryvivirkið, Sørvágs Laks*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Kryvjivirkið hjá Sørvágs Laks tikið í brúk

*Eini 16 fólk fara at arbeiða á snotuliga og nútímans kryvjivirkinum hjá Sørvágs Laks í Sørvági einar 6-8 mánaðar av árinum. Sørvágs Laks er farið at taka eini 400 tons nú og laksurin verður ikki lyftur frá aliringi til marknað*

ÓLAVUR Í BEITI

Gamli bygningurin í Sørvági, sum fyrsta flakavirkið í landinum húsaðist í, er nú rættiliga settur í stand innan. Tað er Sørvágs Laks, sum hevur sett bygningin í stand, og stendur hann eisini øll hugsandi krøv, sum nú eru, tá ið farast skal undir framleiðslu ella virkan. Talan er um kryvjivirkið hjá Sørvágs Laks, sum hevur verið royndarkoyrt nú í nakrar dagar og sambært stjóranum, Gardari Joensen, so er talan um eitt virkið á rættiliga høgum støði.

– Skipanin er at líkna við tað somu »flow« skipan, sum verður brúkt á summum flakavirkjum, og vit meta at kunna taka eini 30 tons um dagin, sigur stjórin í Sørvágs Laks.

Laksurin verður kruvdur, ísaður og pakkaður, og eftir hesi nýggju skipanini verður nógv gjørt við at køla fiskin sum mest.

– Og annar fyrimunur er so eisini við hesi skipan, at nú verður laksurin ongantíð lyftur frá ringi til trailara, sigur Gardar Joensen. Í góðum samstarvi millum íslendsku fyritøkuna Marel, Nomatek og Petersen & Guttesen er eydnast at fáa hetta virkið so nútímans sum hugsandi er í dag, leggur stjórin aftrat.

**Fleiri milliónir**

Spurdur, hvussu stóra íløgu talan er um hjá Sørvágs Laks, sigur Gardar Joensen at talan er um nakrar milliónur krónur, men hetta hevur verið ein sera neyðug íløga, tí tað gamla var ikki tíðarhóskandi.

Í løtuni verður nýggja kryvjivirkið hjá Sørvágs Laks rættiliga royndarkoyrt, tí tikin verða eini 4-500 tons júst nú sum kemur at geva teimum 16 arbeiðsfólkunum á virkinum støðugt arbeiði líka út í mars í ár. So verður støðgur aftur einar 2 mánaðar til tikið verður av nýggjum, men stjórin metir, at arbeitt verður á virkinum 6-8 mánaðar av árinum.

Sørvágs Laks hevur ikki egið sølufelag, men selur, har mest er at fáa fyri fiskin, og sum skilst er písurin einar 29-30 krónur kilo í løtuni.



*Inni á kryvjivirkinum eftir royndarkoyringina í síðstu viku*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Børnum dáma væl fisk til døgurða



»Eksportutvalget for fisk« í Noregi ætlar at læra foreldur at matgera fisk til børn. Eksportutvalget hevur givið bøkur út við uppskriftum og setir verkætlanir í verk í skúlunum, soleiðis at foreldur og børn fáa hugskot til nýggjar og spennandi fiskarættir.

Endamálið við verkætlanini er, at foreldur ikki skulu noyða børnini at eta fisk, tí fiskur er heilsugóður. Dentur verður lagdur á, at børnini sjálvi skulu ynskja sær fisk til døgurða, tí teimum dámar fisk.

Orsøkin til átakið er, at matvanar yvirhøvur eru broyttir nógv síðan foreldrini vóru børn. Nýggir rættir m.a. pitsa og pasta, hava tikið pláss frá meira traditionellum fiskamati.

Kanningar vísa, at børn í nógvum førum siga, at teimum dáma ikki fisk. Royndirnar frá verkætlanini vísa, at børnum dáma væl fisk um tey fáa loyvi at vera við í matgerðini og avgera hvussu fiskurin verður tilgjørdur. »Eksportutvalget« vil tí geva foreldrum hugskot til at nýta fisk í nýggju matmentanini.

»Eksportutvalget« samarbeiðir eisini við skúlaverkið um at brúka nýggju fiskarættirnar í frálæruni í heimkunnleika. Eitt hefti er útgivið við uppskriftum til fiskaburgara, fiskapitsa o.l. fiskarættum og úrslit frá kanningum vísa, at børnunum dámar væl hesar nýggju fiskarættirnar, skrivar Vinnuhúsið í tíðindaskrivi.

